# Dash-óhapp ávirka partabrøv

Óhappini, sum seinastu tíðina hava rakt Dash-flogfør hjá skandinaviska flogfelagnum SAS, hava stórar fíggjarligar avleiðingar fyri SAS og Bombardier-verksmiðjuna, sum hevur gjørt flogførini. Avgerðin hjá myndugleikunum at seta øll Dash 8-flogførini hjá SAS fer ætlandi at kosta felagnum millum 300 og 400 mió. krónur tað, sum eftir er av hesum árinum. Harafturat kemur virðið á partabrøvunum í SAS, sum er fallið munandi síðani tað seinasta Dash-óhappið um vikuskiftið. Í gjár fall virðið 3,2 prosent. Men Bombardier-verksmniðjan fær eisini sviðan av óhappunum hjá SAS, og partabrøvini í kanadisku fyritøkuni eru fallin munandi meiri í virði enn SAS-partabrøvini. Tá marknaðurin í Toronto lat aftur í gjár, var virðið á Bombardier-partabrøvunum fallið 5,0 prosent.



# Knýta sambond millum norðurlendskar vinnulívsleiðarar




*Frá vinstru Leif Bech Fallesen, stjóri á Børsen, Kenneth Plummer, stjóri í DR , og Per Michael Jensen, fyrrverandi stjóri í TV2*

**Á vinnufundinum, sum verður í Eik Banka hósdagin, fer stjórin í Børsen Executiv Club at greiða frá hesum kenda felagsskapinum fyri danskar leiðarar**

VINNUFUNDUR

Á vinnufundinum fer stjórin í danska leiðarafelagsskapinum Børsen Executive Club, Diana Willemoes, at greiða frá, hvussu hesin felagsskapur er skipaður og um møguleikan fyri, at føroyskir vinnulívsleiðarar kunnu fáa atgongd til henda nógv virda leiðarafelagsskapin.

Børsen Executive Club (BEC) er eitt óformligt stað, har kendir persónar taka orðið. Tá kendir útlendskir toppleiðarar vitja BEC, verður ljós varpað á eitt politiskt evni, meðan danskir toppleiðarar luta út av sínum royndum innan leiðslu og royndum í vinnuni.

BEC hevur góð 25 ár á baki og hesi árini hava mong kend nøvn staðið á skránni:

Av kendum talarum kunnu nevnast: Bill Clinton (2001 og 2005), Madeleine Albright, Robert F. Kennedy Jr., Henry Kissinger, Margaret Thatcher, George Bush, Bill Gates og Nelson Mandela. Í vár vitjaði Bono frá U2, fyrrverandi uttanríkisráðharrin í USA, Colin Powell og Steve Forbes, frá Forbes Magasine.

So seint sum í seinastu viku hevði BEC vitjan av Michail Gorbatjov, ið fyri fyrstu ferð vitjaði í Danmark, har hann helt fyrilestur fyri 800 toppleiðarum í Keypmannahavn.

Umframt fyrilestrar og ráðstevnur við kendum nøvnum, skipar BEC fyri uttanlanda ferðum, til tess at styrkja netverkini millum leiðararnar. Í næsta mánað verður farið til heimsins kendasta golfvøll í Florida, USA í eina viku.

- Tað ein kend sannroynd, at tað er í óformligum netverkum, at tær stóru handilsavtalurnar verða gjørdar. Føroyskir leiðarar standa nú frammanfyri einum góðum møguleika at knýta seg í eitt norðurlenskt leiðaranetverk, sum kann fáa ein avgerandi týdning, sigur Finnur Sivertsen, stjóri á Business-Line, ið saman við Børsen skipar fyri vinnufundi í Eik Banka, nú hósdagin.

# Íslendsk fyritøka fer at rinda starvsfólkinum løn í evrum




*Um einar tveir ella tríggjar mánaðir fáa Hörður Arnarsson, aðalstjóri og hini hjá Marel ein part av lønini í evrum ella øðrum fremmandum gjaldoyra*

*Mynd: Vísir*

**Fyritøkan Marel hevur næstan 400 fólk í arbeiði í Íslandi, og skjótt kunnu tey velja at fáa part av lønini í evrum ella øðrum fremmandum gjaldoyra**

ARBEIÐSMARKNAÐUR

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Leiðslan í Martel og tey næstan 400 starvsfólkini eru samd um, at fyritøkan kann gjalda ein part av lønini í evrum ella onkrum øðrum gjaldoyra. Eftir er bara at semjast um, hvussu stóran part av lønini skipanin skal galda.

- Upprunaliga kom hugskotið fyri tveimum árum síðani, men áhugin vísti seg ikki at vera so stórur tá. Hetta seinasta árið hava vit aftur arbeitt við tankanum, og nú eru vit komin so væl áleiðis, at um einar tveir ella tríggjar mánaðir kunnu starvsfólkini fáa ein part av lønini í evrum ella onkum øðrum fremmandum gjaldoyra, sigur Guðmundur S. Guðmundsson, talsmaður hjá Marel, við íslendsk bløð.

Enn er ikki greitt, hvussu nógv av teimum næstan 400 starvsfólkunum vilja hava part av lønini í fremmandum gjaldoyra, men sambært fyritøkuni er áhugin stórur.

Fakligi landsfelagsskapurin í Íslandi hevur verið við í samráðingunum um møguleikan at lata fólk fáa sína løn í fremmandum gjaldoyra. Formaðurin, Grétar Þorsteinsson, sigur við Morgunblaðið, at tað er ikki bara hjá Marel, at tosað berður um at rinda løn í fremmandum gjaldoyra.

- Vit hoyra um hetta nógvastaðni, og fleiri fundir hava verið um málið. Um stutta tíð fara vit undir sáttmálasamráðingar, og tað kann væl vera, at hetta kemur á borðið tá, sigur formaðurin í ASÍ.